## DAGSINS MEINING

# Ferðamanna-siglingin

Tað munnu vera fáir føroyingar, sum ikki vilja ferðamannaskipinum Norrønu alt væl. Tí hetta skip er einasta farið, sum kann føra okkum sjóvegis til og úr Føroyum alt árið. Og hóast vit hava gott flogsamband, so vilja vit sum fjarskotið oyggjaland eisini hava eitt ferðamannaskip tøkt. Og taka vit so samfelagsliga týdningin, sum slíkt ferðamannaskip hevur, her verður serstakliga hugsað um ferðamannavinnuna, so er eingin ivi um, at vit eiga at gera alt fyri ikki at missa slíka rutu av hondum.

Smyril Line hevur sett sær fyri at fáa nýtt skip og harvið verður eisini skaptur møguleiki fyri eini menning av ferðavinnuni her á landi. Tí ein av kanska mest týðandi súlunum undir tí ferðavinnu, sum mong so fegin síggja skal geva pengar av sær til búskapin, er nettup eitt stórt og gott ferðamannaskip.

Men tað er eingin løtt uppgáva at fara undir at byggja slíkt skip. Hvat tú enn gert so vil hetta kosta nógvar pengar, og tá vit eru lutvíst fá í hesum landi at stuðla undir slíka bygging og tað eisini er ein stórur biti at svølgja hjá eini føroyskari fyritøku at gera eina íløgu uppá meira enn 700 mill. kr, so er greitt, at onkur annar má eisini koma við onkrum íkasti. Og her sær so ikki mætari út enn at bæði íslendingar og hetlendingar vilja vera við, nú Norrøna eisini hevur og kann fáa uppaftur størri týdning fyri bæði Ísland og Hetland sum ferðamannalond. Tað var tí gleðiligt at hoyra, at einar 70 mill. kr. verða settar í nýggju Norrønu úr hesum báðum grannalondunum. Nú mugu vit so eisini rokna við, at Framtaksgrunnurin vil vera við og møguliga eisini løgtingið. Tað fer so tíðin at vísa.

Vit seta so okkara vónir til, at framtíðar verkætlanin við nýggju Norrønu fer at eydnast og at hon kann vera landi og fólki at gagni. At hetlendingar nú síggja nyttuna av hesi rutu er eisini at gleðast um, hóast tað uttan iva eru tey, sum heldur høvdu ynskt, at tað vóru skotar, sum settu pening í skipið, og soleiðis at Norrøna kom at sigla aftur uppá Aberdeen. Nú hetlendingar seta pengar í, so merkir tað helst, at leiðslan á Smyril Line verður bundin til í allari framtíð at sigla uppá Hetland. Tað hevur so sínar vansar, men lat okkum heldur síggja positivt uppá hetta nýggja íkastið og so vóna, at siglingin í framtíðini fer at eydnast. Vit kunnu so bara seta okkara álit á, at tað ikki fer at seta kílar í framtíðar møguleikarnar hjá Norrønu, at rutan nú einaferð med alla verður at ganga um Hetland og ikki skotska meginlandið.

**Sosialurin**

# Porkeningurin endaði í Klaksvík

**Tá John W. Thomsen kom til Klaksvíkar í 1938, fall hann væl til á plássinum. Hann hevði hitt gentu úr Klaksvík, og árið eftir giftust tey. Í dag fyllir John 90 ár**

90 ár
*Eyðun Klakstein*


*John W. Thomsen í Klaksvík fyllir 90 ár í dag*

John Thomsen varð føddur í Skemmuni í Porkeri 18. januar fyri 90 árum síðani. Hann var triðelstur av 11 systkjum. Pápi hansara var Johan Andreas úr Fámjin; mamma hansara, Anna Poulina, fødd Djurhuus, var úr Porkeri.

– Tað kundi vera strævið at vera smádrongur. Eg fór upp í alt arbeiði, so skjótt eg var so frægur. Eg fekst við seyð, passaði neyt, arbeiddi fisk og hoyggjaði. Tað var nógv at tríva í, greiðir John frá.

Nógv fólk búði í Porkeri, tá John var smádrongur. Har vóru nógvar barnaríkar familjur, og Porkeri taldist millum tær størri bygdirnar í landinum.

Tá hann var 16 ára gamal, fekk hann lærupláss hjá B&W í Keypmannahavn, og hann fór avstað saman við einum systkinabarni sínum.

– Eg visti lítið um, hvat tað var eg fór avstað til, sigur John.

Síðst í november mánaði í 1926 fóru teir avstað. Hann var í maskinlæru, og lærutíðin var fimm ár. Síðani á Københavns Maskinmesterskole í hálvt annað ár.

– Tá var lítil og eingin frítíð og eingin feria, men eg slapp heim í 1929 við Norðfarinum. Eg fekk frí í tveir mánaðir, og skuldi so læra tað longri, greiðir John frá.

Hann búði á lærlingaheimi í Nørresøgade, har fleiri aðrir føroyingar eisini búðu. Nærmasti granni hansara var Leif Mohr úr Havn.

Hann hevði lítið av pengum um hendi, tíðina hann lærdi, tí vikulønin, hann fekk á arbeiðnum, rakk ikki til gjaldið fyri at búgva á lærlingaheiminum.

Elsta systir hansara, sum tænti hjá einum vælhavandi apotekara niðri, var altíð til reiðar at veita yngra beiggja sínum eina hjálpandi hond.

## Endaði í Klaksvík

Tá John var liðugur at læra, fór hann aftur til Porkeris at búgva. Har var hann til 1936, tá hann fór at sigla. Frá 1936-38 var hann 3. meistari við Ananu. Í 1938 fór hann við hvalabáti úr Suðuroy og var við so leingi, teir veiddu hetta árið.

Um veturin fór hann til Klaksvíkar at arbeiða á bedingini í Klaksvík, har nógv arbeiði var hesa ársins tíð.

Ætlanin var, at hann skuldi fara við einum øðrum hvalabáti úr Suðuroy, tá teir fóru út aftur í 1939, men hetta gjørdist av ongum.

Í Klaksvík hevði hann funnið bæði arbeiði og kærleikan.

John fekk samband til Klaksvíkar, eftir at hann hitti komandi konu sína, Jonhild, í Havn í 1933. Hon var uppvaksin í Klaksvík, og tey hildu samband við hvør annan, og eftir at tey høvdu verið forlovað í eina tíð, giftust tey í 1939.

– Eg hevði einki samband havt við Klaksvík annars, men eg fall væl til, tá eg kom her at arbeiða, greiðir John frá.

Kjølbro keypti í 1939 Næraberg, og manningin á Skálaberg skuldi umborð á nýggja trolaran, tí varð brúk fyri nøggjum fólki til Skálaberg.

– Eg fekk kjans við Skálaberg, sum Mortan í Hvannasundi førdi, og eg helt, at hetta var betri kjansurin enn at fara aftur við hvalabáti.

Skálaberg var úti til seinni heimsbardagi brast á. Tá vórðu øll skipini kallað heim.

Skálaberg var staddur stutt norðan fyri Narvik, tá týskararnir hersettu Noreg í 1940. Høvdu teir verið eitt vet longri suðri, høvdu teir helst verið tiknir, men teir sluppu undan.

Teir settu norðmenninar, sum vóru við, av, tí teir vórðu innkallaðir, og síðani legði Skálaberg leiðina heim til Føroya.

Tá teir komu til Klaksvíkar, var bygdin myrkaløgd orsakað av óttanum fyri bumbuálopum.

## Sigldi nógv

John sigldi við fiski til Bretlands fyrsta partin av krígnum, og hann sá eisini nakað til avleiðingar av krígnum. Teir vóru í Aberdeen, tá álop vórðu gjørd har, og teir sóu eisini ljós frá brennandi skipum í Norðsjónum.

Í august mánaði í 1940 mynstraði John av Skálaberg og fór aftur á bedingina í Klaksvík at arbeiða. Tá var nógv at gera – millum annað umborð á skotskum trolarum.

Kjølbro keypti stutt eftir hetta smiðju í Fuglafirði, og John varð biðin um at fara til Fuglafjarðar at standa fyri smiðjuni. Teir vóru fimm mans, sum fóru til Fuglafjarðar at arbeiða, men tá skipasmiðja kom á Skála og ein nýggj smiðja í Fuglafirði, var eingin orsøk hjá Kjølbro at halda fram.

John fór síðani at arbeiða á skipasmiðjuni á Skála, har teir millum annað umvældu ensk herskip. Hann skifti millum at arbeiða í Klaksvík og á Skála.

– Mær dámdi væl at arbeiða sum smiður í landi. Tað var fjølbroytt og gott arbeiði, sigur John Thomsen.

Hann var tó nógvar túrar til skips seinni. Millum annað við Nólsoyar Páll, Jóannes Patursson og nýggja Sjúrðaberg, sum kom í 1948. Hendan Kjølbro-trolaran var John bæði við til at sigla heim og at avreiða í Gent smá 20 ár seinni. Eisini var hann við Karin K.

– Tað var nógvur fiskur at fáa, alt tað sum eg var til skips. Bæði eystanfyri og í Grønlandi, sigur John.

- Eg havi fiskað lítið undir Føroyum – mest undir Íslandi, Grønlandi og eystanfyri.

Í 1964 fór hann at arbeiða fyri Norsk Veritas í Føroyum. Tað vóru so nógv skip bygd í Føroyum tá, at Johan Rasmussen, sum var umboðsmaður fyri Norsk Veritas, kláraði ikki alt arbeiðið einsamallur.

Í 1968 skifti John til Tryggingarsambandið at arbeiða, og har varð hann verandi til mai mánað í 1983, tá hann fór frá sum 72 ára gamal.

Eftir tað hevur John húsast í Víkunum saman við Jonhild, sum í dag er 87 ára gomul. Tey eiga børnini Onnu, Káru og Tove. Sonurin Páll doyði fyri 10 árum síðani. Abbabørnini eru tíggju í tali og langabbabørnini fimm.

Hóast John ikki longur er so oftani at síggja, so er hann tó enn ein livandi partur av býarmyndini í Klaksvík. Saman við vinmanninum Einari Mortensen plagar hann at fara biltúr. John fylgir annars framvegis væl við í øllum tí, sum fyriferst heima sum burturi. Hann er ein sera gløggur eygleiðari og viðmerkari, og tað fer eingin tíðindasending í útvarpi ella sjónvarpi framvið, uttan at John hevur fingið týdningarmestu tíðindini við.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Bíligari og skjótari loysnir á barnagarðsøkinum

**- Vit fara at leggja stóra orku í at útvega so nógv stovnspláss sum til ber. Og tað er greitt, at vit fara at síggja bíligari og skjótari loysnir, sum kortini eru góðar, sigur Jan Christiansen, býráðsformaður í Havn**

BØRNINI
*Turið Kjølbro*

Arbeiddi undanfarna býráð í høvuðsstaðnum miðvíst at útvega stovnspláss til minstu borgararnar í kommununi, ætlar býráðið, sum nú hevur tikið við, at gera enn meir. Tað sigur nýggi býráðsformaðurin í Havn, Jan Christiansen.

– Tey sekstan árini, eg havi sitið í býráðnum, hevur einki mál savnað so nógvar býráðslimur, sum hetta at útvega fleiri stovnspláss. Og komandi fýra árini fara vit at leggja doyin á at loysa trupulleikan.

Barnaansingarøkið fær sostatt høga raðfesting komandi árini, men kortini torir hann ikki at lova, at øll foreldur kunnu vænta sær stovnspláss til síni børn.

– Havnin veksur alla tíðina, somuleiðis bíðilistin, og tí kunnu vit ikki siga, at vit megna at útvega øllum pláss, sigur Jan Christiansen.

Í løtuni bíða 312 børn eldri enn hálvt ár eftir stovnsplássi í Tórshavnar kommunu, og um tveir mánaðir er greitt, hvørji eru so heppin at sleppa í vøggustovu og barnagarð, tá ið tey næstu plássini verða lutað út.

– Høvuðsmálið má vera, at skipanin er rættvís og at allir borgarar eru líka fyri lógini. Vit hoyra oftari tey, sum eru ónøgd, men vit koma ikki uttanum, at 75 prosent av tørvinum er nøktaður, sigur hann.

## Bíligari loysnir

Einasta gongda leið fram ímóti málinum at útvega øllum børnum stovnspláss, er at gera bíligari loysnir enn tær, vit hava sæð.

– Seinasta seta varð merkt av, at nógvar hálvar loysnir vórðu gjørdar. Nógvar hava verið góðar, men hesin mátin er nærum við at verða úttómdur. Ein ríðingarhøll verður bygd í Havnardali, har ein útibarnagarður fer at halda til. Og aðrir møguleikar eru eisini. Men skal nakað munagott henda, eru vit noydd at byggja fleiri smærri stovnar. Og skal tað ikki taka ov langa tíð, sum dagstovnurin, ið verður bygdur í løtuni er eitt dømi um, nyttar ikki at hugsa um stórar og dýrar stovnar. Heldur eru vit noydd at hyggja at býlingshúsunum, sum eru runt um í býnum, og gera fleiri slíkar loysnir. Hesir stovnar eru góðir, skjótir at gera, líkir hvør øðrum og tí skal ikki tað stóra fyrireikingararbeiðið til. Tí fara vit at síggja týpuhús-loysnina. Kanska ikki so áhugaverdar loysnir, men kortini forsvarligar og bíligar, sigur Jan Christiansen.

Sambært samgonguskjalinum hjá nýggja býráðnum skulu alternativar loysnir finnast. Fyri tveimum árum síðani var møguleiki hjá foreldrum, sum vóru heima hjá sínum børnum, at fáa kontantgjald. Gjaldið varð seinni avtikið, tí lógargrundarlagið var ikki í lagi. Tað skerst ikki burtur, at tað var serliga Fólkaflokkurin, sum tosaði heitt fyri hesi loysnini. Men kortini roknar býráðsformaðurin ikki við, at henda loysnin verður tikin fram aftur í øðrum líki soleiðis at hon er í samsvari við lógina.

– Politiskur uppbakningur er ikki fyri hesi skipanini, sigur hann.

Trupult hevur verið at fingið nóg mikið av dagrøktarmammum. Nú tað ber til at ansa egnum børnum samstundis, hevur borið til at fingið fatur á fleiri.

## Dagstovnur á veg

Hvussu skjótt arbeiðast skal frameftir og hvussu nógv pláss skulu útvegast um árið, er ikki stungið út í kortið enn. Enn er sosiala nevnd, sum eigur barnaansingarøkið sum málsøki, bert skipað.

Í vesturbýnum í Havn verður ein dagstovnur bygdur í løtuni, og heldur tíðarætlanin, verður hann liðugur seint í summar. Upprunaliga var ætlanin, at hann skuldi taka 60 børn, men mánadagin varð í byggi- og býarskipanarnevndini samtykt, at gera eina stovu afturat.

– Møguleiki verður fyri at taka 20 børn inn afturat, um talan er um barnagarðsbørn. Velja vit at gera vøggustovu ella stovu til børn við serligum tørvi, verður talið minni, sigur Jan Christiansen.

Sjálvur stovnurin uttan grundøki fer at kosta um 8 mió. kr.

Í farnu viku var ein nýggjur barnagarður í eygsjón. Føroya Tele hevði í umbúna at keypa sethús í Hoyvík og byggja tey um til barnagarð, men eftir at stovnurin fekk mótmæli frá grannum og eigarafelag, hevur Føroya Tele slept ætlanini.

– Tað er ógvuliga spennandi, at ein stovnur tekur eitt slíkt stig, og eg rokni við, at fleiri fara at gera tað sama. At júst hetta keypið fer fyri bakka, undrar ikki meg. Tað hendir ferð aftaná ferð, tá ið stovnar ella annað skal leggjast út í bústaðarøki, at fólkini í økinum muta ímóti, tí fortreytirnar hjá teimum verða broyttar. Og tað vita vit, sigur Jan Christiansen.

Eingin ítøkilig ætlan frá øðrum stovnum um at gera barnagarð til síni starvsfólk liggur á borðinum í løtuni, men fyrispurningar hava verið fleiri.


*- Havnin veksur alla tíðina, somuleiðis bíðilistin, og tí kunnu vit ikki siga, at vit megna at útvega øllum pláss, sigur Jan Christiansen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Barsilsskipan á ting

**Seinnapartin í gjár varð fyrsta viðgerð av uppskotinum til løgtingslóg um barsilsskipan**

BØRNINI
*Turið Kjølbro*

Beint fyri jól legði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, fyri tingið uppskot um nýggja barsilsskipan. Skipanin javnsetur allar kvinnuligar løntakarar og er serliga eitt stórt framstig hjá teimum, ið arbeiða á privata arbeiðsmarknaðinum.

Sambært uppskotinum hava foreldur eftir barnsburð rætt til barsilsfarloyvi í tilsamans 24 vikur. Av teimum 24 vikunum kann pápin at barninum nýta tær 10 vikurnar eftir 14. viku eftir barnsburð. Rætturin til barsilsfarloyvi kann bert verða nýttur av einum av foreldrunum í senn. Umframt hevur pápin rætt til farloyvi í upp til tvær vikur eftir barnsburð. Foreldur, ið ættleiða barn, hava rætt til barsilsfarloyvi í sama mun, sum tey hava rætt til barsilspening.

Tey, ið fara í barsilsfarloyvi fáa fulla løn í farloyvistíðini, tó ikki meiri enn 35.000 kr. um mánaðin, og hóast tað ikki framgongur týðiliga í upprunauppskotinum, verður tað lønargrundarlagið hjá tí foreldrinum, sum er í farloyvi, sum liggur til grund fyri útgjaldinum.

## Øll gjalda

Landskassin ber útreiðslurnar til barsilspening. Allir lønmóttakarar, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum, hava skyldu at gjalda.

Mett verður, at árliga útgjaldið frá skipanini vegna barnsburð og ættleiðing til mammur og pápar verður uml. 44-46 mió. kr. Verða uml. 25 mió. kr. fíggjaðar yvir vanliga skattin, eru eftir at fíggja uml. 21 mió. kr. Til fígging av meirkostnaðurin er ætlanin at leggja eitt prosentgjald á A-inntøkur uppá 0,25%, sum løntakarar móttaka og sum arbeiðsgevarar rinda, ella tilsamans 0,50 %.

Arbeiðsloysistryggingin skal umsita barsilsskipanina. Mett verður, at kostnaðurin av umsitingini verður uml. 1,8 mió. kr. árliga. Fyrsta árið verður kostnaðurin tó uml. 2,8 mió. kr., við tað at byrjanarkostnaðurin verður mettur til kr. 1 mió. kr.

## Stórt framstig

Javnstøðunevndin hevur í fleiri ár mælt til, at gjørd verður ein skipan, sum tryggjar øllum løntakarum fulla løn í sambandi við fráveru frá arbeiði, orsakað av barnsburði og ættleiðing. Somuleiðis bæði Løgtingsins trivnaðarnevnd og Útnorðurráðið. Og hóast fakfeløg í ummælum av lógaruppskotinum vísa á viðurskifti, sum kunnu og eiga at verða øðrvísi, taka mest sum øll undir við uppskotinum.

– Tað er sera týdningarmikið, at allir løntakarar á arbeiðsmarknaðinum eru javnsettir, tá ið tað ræður um at eiga børn og vera heima hjá teimum. Møguleiki er altíð seinni at gera broytingar og tillagingar, um vilji er til tað í tinginum. Vit hava lagt okkum eftir at gera eina bíliga skipan, sum kortini er munagóð og víðfevnd, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, í samrøðu við Sosialin í farnu viku.

Fyrsta viðgerð av lógaruppskotinum var í tinginum ígjár. Uppskotið skal hava tríggjar viðgerðir, og verður arbeiðið í nevndunum ikki ov drúgt, fer nýggja barsilsskipanin eftir øllum at døma at virka frá 1. apríl sum ætlað.